GJALDSTOVAN

# Ársfrágreiðing 2022

## Keypsportalurin



www.keypsportal.fo

# Innihald


1 Inngangur 1

2 Søgan hjá rundskrivinum um keyp av vørum og tænastum 3

3 Royndirnar við rundskrivinum 5
- Innkeyps- og útboðsroyndir
- Ársfrágreiðing hjá Landsgrannskoðanini
- Vantandi royndir og upplýsingar
- Undantøk

4 Tiltøk 10
- Uppskot um broytingar
  - Broyting av upphæddum og freistum
  - Krav um hagtøl
  - Grein 3.2
  - Ráðgeving, amboð og vegleiðingar

5 Keypsportalurin 13
- Hagtøl og greiningar
  - Nýtsla av Keypsportalinum
  - Undantøk
- Kærur
- Keypsportalurin skal dagførast
- Tilboðsfyrispurningar skulu skrásetast

6 Sparingar 18

7 Samanumtikið 20



# Ársfrágreiðing 2022

Keypsportalurin

## 1 Inngangur

Gjaldstovan skal sambært rundskrivi nr. 9003 frá 1. juli 2019 um keyp av vørum og tænastum árliga gera eina frágreiðing, sum verður almannakunngjørd á keypsportal.fo.

Ársfrágreiðingin inniheldur:

- eina lýsing av søgugongdini hjá rundskrivinum
- royndirnar við rundskrivinum og yvirskipaða innkeyps- og útboðspolitikkinum hjá landinum
- tær broytingar, ið eru farnar fram tey árini, keypsportal.fo hevur verið virkin
- tilmæli um, hvussu innkeyps- og útboðspolitikkurin hjá landinum kann betrast soleiðis, at grundleggjandi hugburðurin til innkeyp verður meira í samsvari við endamálsorðing og meginreglur í rundskrivinum um keyp av vørum og tænastum.

# 2 Søgan hjá rundskrivinum um keyp av vørum og tænastum

# 2 Søgan hjá rundskrivinum um keyp av vørum og tænastum

**Í 2010 setti landsstýrið ein arbeiðsbólk, sum skuldi lýsa og orða ein innkeyps- og útboðspolitikk fyri keyp av vørum og tænastum hjá landinum.**

Endamálið hjá arbeiðsbólkinum var at skipa ein innkeyps- og útboðspolitikk soleiðis, *at:*
*“1) uppgávurnar hjá tí almenna verða kappingarútsettar í tann mun, tað er skynsamt,*
*2) vøksturin og effektiviteturin í privata geiranum verður stimbraður og*
*3) privatar fyritøkur fáa javnbjóðis møguleikar at bjóða seg fram til at loysa uppgávur fyri tað almenna”.*

Við endamálinum í huga orðaði arbeiðsbólkurin ein innkeyps- og útboðspolitikk, sum var bygdur á tríggjar meginreglur:

*Meginregla 1: Virði fyri pening skattgjaldarans*

*Meginregla 2: Gjøgnumskygni*

*Meginregla 3: At fremja virkna kapping.*

Endamálið og meginreglurnar skuldu skapa karmarnar og vera galdandi fyri alt keyp av vørum og tænastum óansæð innkeypshátt.

Í mars 2012 setti landsstýrið í gildi innkeyps- og útboðspolitikkin fyri keyp av vørum og tænastum hjá landinum. Politikkurin varð, umframt endamálið og meginreglurnar omanfyri, grundaður á eina lógarbundna skyldu, sum er sprottin úr løgtingslóg nr. 42 frá 4. mai 2009 um landsins játtanarskipan, har allir landsins stovnar og myndugleikar skulu taka neyðug búskaparlig atlit.

Eftir hetta varð rundskriv um keyp av vørum og tænastum sett í gildi í 2013, har krøv vórðu sett til landsins stovnar í sambandi við keyp av vørum og tænastum. Í 2016 og 2019 varð rundskrivið endurskoðað og dagført. Sum dømi um dagføringar kunnu verða nevndar, at tær upprunaligu upphæddirnar, fyri nær keyp av vørum og tænastum skulu bjóðast út alment, eru lækkaðar. Gjaldstovan er í gongd við at endurskoða rundskrivið, og komið verður við tilmælum um broytingar, sí pkt. 4 niðanfyri.

Í 2019 varð myndugleikin at umsita keypsportal.fo lagdur til Gjaldstovuna. At fyrisita økið varð eitt starvsfólk sett. Virksemið hevur verið støðugt vaksandi við fleiri rammusáttmálum, ymiskum ráðgevara uppgávum, undantøkum v.m. Í 2022 varð eitt starvsfólk sett afturat soleiðis, at Gjaldstovan í dag hevur tvey starvsfólk at umsita innkeyp hjá landinum.

# 3 Royndirnar við rundskrivinum

# 3 Royndirnar við rundskrivinum

Galdandi rundskriv hevur verið við til at skapa eina meira skipaða tilgongd og harvið ríkari útboðsmentan, tá ið um ræður keyp av vørum og tænastum. Krøvini í rundskrivinum um at:

- treytir til alment útboð og tilboðsfyrispurningar skulu vera væl lýstar í tilfarinum
- tilfarið skal innihalda tíðarfreistir fyri:
  - nær tilboð skulu vera inni
  - nær tilboð verða almannakunngjørd
  - nær avgerð verður tikin v.m.

hava verið við til at gera útboðstilfarið hjá landsins stovnum meira einsháttað.

## 3.1 Innkeyps- og útboðsroyndir

Gjaldstovan hevur sambært grein 8.1.2 í rundskrivinum heimild at gera rammusáttmálar fyri ávísar vørur og tænastur fyri stovnar, sum eru fevndir av rundskrivinum.

Landsins stovnar eru sum so ikki ímóti at fylgja galdandi rammusáttmálum, men fleiri eru ikki til reiðar at taka undir við at gera rammusáttmálar. Grundgevingarnar fyri hesum eru tær umsitingarligu útreiðslurnar, sum eru tengdar at einum møguligum skifti og vandin fyri, at eitt skifti kann skapa ótryggleika. Man veit hvat man hevur, men man veit ikki hvat man fær.

Hesi atlit eru ikki í tráð við endamálið í yvirskipaða innkeyps- og útboðspolitikkinum í pkt. 2 um, at privatar fyritøkur fáa javnbjóðis møguleikar at bjóða seg fram til at loysa uppgávur fyri tað almenna.

Av tí, at fleiri stovnar ikki taka undir við at gera rammusáttmálar, hevur Gjaldstovan skrivað í rammusáttmálarnar, at stovnar ikki eru bundnir, men teir hava rættin til sjálvboðið at brúka teir. Avleiðingin av hesum er mistar sparingar fyri landið, tí landið ikki kann tryggja privatu fyritøkunum eina hægri væntaða søluinntøku.

Tað er vert at nevna, at Gjaldstovan ikki hevur nakrar heimildir at tvinga stovnarnar at fylgja rundskrivinum, og tað soleiðis sæð, ikki hendir nakað, um stovnarnir velja at gera nakað annað, enn tað sum Gjaldstovan ætlar ella avtalar.

Útboðini av dátusamskifti, røkt av akførum, telduútgerð og vaktarhald av bygningum kunnu nevnast sum dømi, har landið hevur havt góð úrslit av at bjóða út alment. Hesi útboð eru samstundis eisini dømi um “tap” fyri landið orsakað av mistum sparingum, t.e. sparingar, ið høvdu verið størri, um landsins stovnar høvdu bjóðað út í felag og vóru bundnir av rammusáttmálunum.

# 3 Royndirnar við rundskrivinum

Útboðið viðvíkjandi dátusamskifti hevði eina árliga sparing uppá 15%, svarandi til 551 tús. kr. fyri stovnar í Landsneti. Stovnar, sum ikki eru í Landsneti, høvdu eina sparing uppá 0,4%, svarandi til 10 tús. kr., tí nakrir av stovnunum uttanfyri Landsnet ikki vildu verða partur av rammusáttmálanum.

Sparingin fyri stovnar uttanfyri Landsnet hevði eisini verið 15%, um hesir vóru bundnir av rammusáttmálanum, sum svarar til 365 tús. kr. um árið.



Útboðið viðvíkjandi røkt av akførum gav eina árliga sparing upp á 25%, svarandi til umleið 135 tús. kr. samanborið við prísin av innkomnu tilboðunum. Samlaða sparingin inniheldur eisini 47 tús. kr. árliga, sum er fyri koyring til og frá verkstaðnum svarandi til 182 tús. kr. Tað almenna hevur umleið 232 akfør, sum kundu verið viðkomandi fyri sáttmálan, men bert akførini hjá Almannaverkinum, svarandi til 79 akfør, eru bundin av sáttmálanum. Samlaða sparingin kundi sostatt verið 535 tús. kr., um øll akførini hjá tí almenna vóru bundin av sáttmálanum.

Vaktarhald av bygningum gav eina sparing upp á 48% samanborið við prísirnar, áðrenn Gjaldstovan bjóðaði tænastuna út sum alment útboð.

Hetta úrslitið var fyri tveir bygningar. Gjaldstovan og Umhvørvisstovan gjalda til samans 79.680 kr. um árið fyri vaktarhald. Ein leyslig meting vísir, at um helvtin av almennu bygningunum vóru felags um útboðið, kundi sparingin verið umleið 1,4 mió. kr. um árið. Gjaldstovan heldur, at tað hevði verið skynsamt, um fleiri av landsins stovnum verða partur av útboðnum, næstu ferð tænastan verður boðin út.

# 3 Royndirnar við rundskrivinum

Landssjúkrahúsið vildi ikki vera við í útboðnum av telduútgerð, tí tað ikki varð sett krav um eitt ávíst teldumerki, sum skuldi vera HP. Útboðið endaði við, at tað varð HP, sum vann útboðið. Um Landssjúkrahúsið ikki hevði fingið sín vilja um ávíst teldumerki, hevði landið havt eina størri keypiorku, og tískil er sannlíkt, at útboðið kundi givið enn betri prísir.

Ferðatryggingar og biltryggingar eru dømi um bindandi rammusáttmálar fyri allar landsins stovnar, sum virka væl. Árliga sparingin fyri hesar báðar rammusáttmálarnar eru umleið 1,5 mió. kr.

Omanfyristandandi dømi vísa, at tað loysir seg at bjóða út. Dømini vísa eisini, at størri nøgd verður bjóðað út, jú lutfalsliga betri prís fær landið. Tí skal størri dentur verða lagdur á at bjóða so stóra nøgd út sum møguligt og binda stovnarnar at luttaka í útboðum.

## 3.2 Ársfrágreiðing hjá Landsgrannskoðanini

Í ársfrágreiðingini hjá Landsgrannskoðanini fyri fíggjarárið 2021 sæst, at stovnar ikki altíð fylgja reglunum um at bjóða út sambært rundskrivinum og hava heldur ikki søkt um undantak frá at bjóða út. Grundgevingarnar, sum verða nýttar, eru, at stovnarnir ikki hava orku at gera útbjóðingartilfar ella tilboðsfyrispurningar. Eisini eru dømi um, at stovnar halda ávísar veitarar vera bestar at loysa uppgávurnar, ella at tænastan er so serstøk fyri stovnin, at hon ikki kann bjóðast út millum fleiri.

At enda vísir Landsgrannskoðarin á, at einki forðar stovnum fyri at biðja um óbindandi tilboð frá fleiri veitarum til keyp av vørum og tænastum, sum kosta undir 50.000 kr. Hetta hevði verið góður skikkur út frá sjónarmiðnum um at fáa sum mest fyri pening skattgjaldarans.



*Stovnar fylgja ikki altíð reglunum um at bjóða út sambært rundskrivinum*

Landsgrannskoðanin 2021

# 3 Royndirnar við rundskrivinum

## 3.3 Vantandi royndir og upplýsingar

Royndirnar hjá Gjaldstovuni eru, at útboðsmentanin støðugt verður betri, men enn er eitt sindur eftir á mál. Eins og umsitingin hjá summum stovnum vanta royndir at framleiða útboðstilfar, so vanta privatar fyritøkur eisini royndir at framleiða tilboð, sum lúka treytirnar, sum settar verða í útbjóðingartilfarinum, t.d. tilboð sum ikki verða latin inn til tíðina, sum ikki lúka minstukrøv og annars vanta kravdar upplýsingar.

Úrslitið av hesum er í ringasta føri, at útbjóðari er noyddur at bjóða út av nýggjum. Hetta er bæði tíðarkrevjandi og økir um arbeiðsbyrðuna hjá tí almenna og tilboðsgevarum.

Royndirnar vísa eisini, at ofta vanta upplýsingar um góðskuna á vørunum ella tænastunum, sum eru fevndar av útboðnum. Sjálvt um vantandi upplýsingarnar ikki elva til, at tilboð verða burturvíst, so merkir hetta, at tilboðið ikki fær tann karakterin, tilboðið møguliga hevur uppiborið. Tá ið ein slík støða kemur fyri, verður prísurin tann einasta avgerandi fyritreytin í metingini.

Samanumtikið kunnu vit siga, at innkeyps- og útboðsmentanin er ment nógv seinastu trý árini. Fleiri stovnar bjóða út í samsvari við krøvini í rundskrivinum, og fleiri biðja um undantak, tá ið hetta er neyðugt. Privatu fyritøkurnar royna í størri mun at geva tilboð í samsvari við treytirnar í útbjóðingartilfarinum. Tað tekur tíð hjá báðum pørtum at ogna sær royndir og vitan innan økið, og harvið broyta atferðina.

## 3.4 Undantøk

Gjaldstovan hevur sett eina skipan í verk, sum hevur til endamáls at lætta um mannagongdir í sambandi við viðgerð av umbønum um undantøk. Gjaldstovan hevur til hetta endamálið framleitt oyðublað við vegleiðing at fylla út.

Hóast oyðublað við vegleiðing vísa royndirnar, at flestu stovnar ikki vísa til tær ásetingar í rundskrivinum, sum biðið verður um undantak fyri. Gjaldstovan má tískil ofta gita sær til, hvat biðið verður um undantak fyri, ella má biðja um eina útgreining av umbønini. Harafturat má Gjaldstovan staðfesta, at umbønirnar um undantak ofta eru grundaðar við persónligum orðingum sum "øll vita", "hetta hevði verið lættari hjá okkum", "ein ráðgevi hevur fortalt okkum" o.tíl. Tá landsins stovnar ikki halda seg til ásetingarnar í rundskrivinum, hevur hetta eina óneyðuga og tíðarkrevjandi viðgerð av umsóknunum við sær.

# 4 Tiltøk

# 4 Tiltøk

## 4.1 Uppskot til broytingar

Tað tekur, sum nevnt omanfyri, tíð at broyta atferðina, og m.a. tí er neyðugt at hyggja eftir tiltøkum, sum kunnu vera við til at hjálpa landsins stovnum at gera innkeyp og útboð og stimbra útboðsmentanina meira alment.

### 4.1.1 Broyting av upphæddum og freistum

Gjaldstovan heldur, at upphæddirnar í rundskrivinum eiga at verða lækkaðar. Hetta fyri at økja um gjøgnumskygnið og fremja eina meira virkna kapping á føroyska vøru- og tænastumarknaðinum.

Krøvini til ávikavist alment útboð og tilboðsfyrispurning í rundskrivinum eru næstan eins. Krøvini eru ymisk í mun til upphædd og freist at seta spurningar til tilfarið, men ikki til sjálvt innihaldið í tilfarinum. Í dag skulu keyp av vørum og tænastum yvir 500.000 kr. uttan MVG verða lýst á keypsportal.fo. Í sambandi við keyp av vørum og tænastum undir 500.000 kr. uttan MVG er ikki krav um at lýsa á keypsportal.fo. Hinvegin verður kravt, at biðið verður um tilboð frá í minsta lagi tveimum veitarum. Keyp undir 50.000 kr. uttan MVG er ikki fevnt av rundskrivinum uttan so, at rammusáttmálar eru galdandi á økinum.

Veitarar fáa eina freist á *eina til tvær vikur* at seta spurningar í sambandi við alment útboð, har veitarar í sambandi við tilboðsfyrispurning fáa eina *stutta freist* at seta spurningar. Gjaldstovan heldur, at tað ikki skal vera ásett ein longd á tíðarfreistini í rundskrivinum. Tað skal standa í rundskrivinum, at tað skal vera ein *hóskandi freist*, sum verður mett um frá útboði til útboð.

Arbeiðsbyrðan er í stóran mun hin sama hjá útbjóðara uttan mun til, um útbjóðari skal brúka alment útboð ella tilboðsfyrispurning sum innkeypshátt. Tað er samansetingin av sjálvari vøruni ella tænastuni, sum er avgerandi fyri arbeiðsbyrðuna hjá útbjóðara heldur enn sjálv upphæddin. Eisini er tað ein sannroynd, at talið av tilboðsgevarum á føroyska marknaðinum sjáldan fer upp um 2 til 4. Tað hevur sostatt lítið at siga, um sæð verður upp á arbeiðsbyrðuna, um útbjóðari skal lýsa tilfarið á keypsportal.fo ella, um tilfarið skal sendast út til í minsta lagi tveir útvaldar veitarar. Hetta hevur hinvegin nógv at siga í mun til atgongd og opinleika hjá tí almenna og privatum fyritøkum.

Gjaldstovan heldur, at markið fyri keypi, har alment útboð skal verða nýtt sum keypsháttur, skal lækkast soleiðis, at fleiri útboð verða lýst á keypsportal.fo. Hetta hevði verið við til at økt um atgongdina og opinleikan og hevði verið við til at framt eina meira virkna kapping á føroyska vøru- og tænastumarknaðinum.

# 4 Tiltøk

### 4.1.2 Krav um hagtøl

Gjaldstovan hevur havt trupult við at fáa nakrar stovnar at avgreiða teirra útboð á keypsportal.fo og lata inn hagtøl og aðrar upplýsingar. Gjaldstovan hevur í summum førum fingið at vita frá stovnum, at einki stendur í rundskrivinum um at lata inn upplýsingar. Fyri at skapa greidleika, heldur Gjaldstovan, at tað eigur at vera ein áseting um, at stovnar hava skyldu til at lata inn hagtøl og aðrar upplýsingar til Gjaldstovuna, sum er myndugleikin á økinum.

### 4.1.3 Grein 3.2

Í grein 3.2 stendur, at rundskrivið ikki er galdandi fyri løgu- og byggiverkætlanir. Gjaldstovan heldur at hetta skal verða broytt til, at rundskrivið ikki er galdandi, har licitatiónslógin, løgtingslóg nr. 106 frá 15. november 1984 um útbjóðing v.m., er galdandi. Grundgevingin er, at tað finnast løgur, sum ikki eru fevndar av licitatiónslógini. Hetta merkir, at tað eru fleiri keyp av vørum, sum detta í millum tvey sett av reglum. Gjaldstovan heldur, at útbjóðari skal tilluta sáttmálar eftir teimum reglum, sum eru galdandi fyri tí eftirspurdu veitingina og ikki eftir tí játtan, har útreiðslan verður hildin.

### 4.1.4 Ráðgeving, amboð og vegleiðingar

Í ársfrágreiðingini hjá Landsgrannskoðanini, sum er viðgjørd í pkt. 3.2 omanfyri, sæst, at fleiri stovnar ikki altíð fylgja reglunum í rundskrivinum um at bjóða út vørur og tænastur, har grundgevingin hevur verið, at stovnar antin ikki hava neyðugu orkuna ella førleikarnar at gera útboðstilfar.

Í dag eru fá útboð á keypsportal.fo, sum Gjaldstovan á ein ella annan hátt ikki eigur sín lut í, tá ið hugsað verður um tekniska, løgfrøðiliga og handilsliga ráðgeving. Gjaldstovan hevur ment fleiri amboð, frymlar og vegleiðingar, sum stovnarnir kunnu brúka. Gjaldstovan hevur ætlanir um at leggja alt tilfarið út á keypsportal.fo í 2023. Gjaldstovan vil við hesum, umframt at umsita keypsportal.fo, eisini bjóða út ráðgeving til stovnar, sum antin ikki hava neyðugu orkuna ella royndirnar at gera útboðstilfar.

# 5 Keypsportalurin

# 5 Keypsportalurin

## 5.1 Hagtøl og greiningar

Gjaldstovan hevur ment eina skipan, har gjørligt er at greina rokningar, sum verða móttiknar talgilt. Í 2022 keypti landið inn fyri umleið 1,7 mia. kr. av vørum og tænastum, sum eru býttar út á 204.799 rokningar og 1.078.299 vørulinjur. Ein greining í 2018 vísti býtið av rokningunum í mun til upphædd.

| Talstrekki | Prosent |
|---|---|
| 0-200 kr. | 24% |
| 0-600 kr. | 50% |
| 0-10.000 kr. | 91% |
| 0-50.000 kr. | 98% |
| 0-500.000 kr. | 99,8% |

*Talva 1: Prosentbýtið av rokningunum í ymsu talstrekkjunum.*

Talva 1 vísir, at helvtin av øllum innkeypi er minni enn 600 kr., sum í nógvum førum er ein upphædd, ið ikki verður bjóðað av. Talvan vísir eisini, at tað bara eru 2% av keypunum, sum koma undir reglurnar um at heintast skal inn tilboð ella gerast skal eitt alment útboð. Greiningin vísti eisini, at færri enn 0,2% av rokningunum vóru omanfyri 500.000 kr. og tískil møguliga bundnar av regluni um alment útboð.

Fyri at náa teimum lægru bólkunum í talvuni omanfyri hevur Gjaldstovan lagt seg eftir at skipa innkeyp umvegis rammusáttmálar. Gjaldstovan heldur eisini, sum áður nevnt í pkt. 4.1.1., at upphæddirnar í einum komandi rundskrivi skulu lækkast í mun til, nær kravt verður at heinta inn tilboðsfyrispurning, og nær kravt verður at gera alment útboð.



*Helvtin av øllum rokningum til landið eru minni enn 600 kr.*

# 5 Keypsportalurin

## 5.1.1 Nýtsla av Keypsportalinum

| Støða | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | Til samans |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Avgreidd** | 4 | 19 | 24 | 14 | 13 | 15 | **11** | **25** | **38** | **27** | **190** |
| **Avlýst** | | 1 | | 2 | 1 | 3 | | **1** | **4** | | **12** |
| **Í útboði** | | | | | | | | **4** | **7** | **13** | **24** |
| **Í viðgerð** | | | | 2 | 7 | 22 | **5** | **4** | | **1** | **41** |
| **Útsett** | | | 3 | | | | | | | | **3** |
| **Til samans** | 4 | 20 | 27 | 18 | 21 | 40 | **16** | **34** | **49** | **41** | **270** |

*Talva 2: Árlig útboð á Keypsportalinum*

Í 2018 vóru nógv útboð í sambandi við, at Glasir varð tikið í nýtslu. Um sæð verður burtur frá hesum, er talan um ein javnan vøkstur, síðan myndugleikin varð skipaður undir Gjaldstovuni.



*Við árslok 2022 vóru 270 útboð skrásett á keypsportal.fo*

# 5 Keypsportalurin

## 5.1.2 Undantøk

Í talvuni niðanfyri sæst, at umsøknir um undantøk frá reglunum í rundskrivinum eru farnar frá 0 til 18 seinastu trý árini.

Ongin umsókn er skrásett undan 2020, og Gjaldstovan er ikki vitandi um, at hetta hevur verið mannagongd áðrenn. Stovnar hava í dag størri innlit og gerast støðugt meira tilvitaðir um at fylgja reglunum í rundskrivinum við m.a. at søkja um undantak frá reglunum í rundskrivinum. Gjaldstovan hevur sum nakað nýtt í 2022 skrásett og almannakunngjørt øll undantøk á keypsportal.fo, og higartil eru 32 játtaðar umsóknir skrásettar.

## 5.2 Kærur

Gjaldstovan hevur móttikið eina kæru í sambandi við, at stovnur hevur framt brot á fleiri ásetingar í rundskrivinum. Aðalráðini hava ábyrgd av at viðgera kærumál, ið snúgva seg um teirra stovnar. Kæran snýr seg í stuttum um, at stovnurin ikki fylgdi fleiri av ásetingunum í rundskrivinum. M.a. varð alment útboð ikki nýtt, hóast upphæddin var omanfyri 500.000 kr., prísurin vigaði bara 25%, og kravlýsingin var skraddaraseymað til ávíst merki og óviðkomandi fyri endaligu nýtsluna.

Aðalráðið gav kærara viðhald í, at brot vóru gjørd á ásetingar í rundskrivinum, og stovnurin fekk boð um at eftirkanna mannagongdir sínar í sambandi við keyp av vørum og tænastum.

| Stovnur | 2020 | 2021 | 2022 | Til samans |
|---|---|---|---|---|
| Landssjúkrahúsið | 2 | 2 | 13 | 17 |
| Umhvørvisstovan | 1 | 3 | | 4 |
| Fjarskiftiseftirlitið | 1 | | 1 | 2 |
| Fíggjarmálaráðið | | | 1 | 1 |
| Løgmansskrivstovan | | 1 | | 1 |
| Apoteksverkið | | | 1 | 1 |
| Undirvísingarstýrið | | 1 | | 1 |
| Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu | 1 | | | 1 |
| Tjóðsavnið | | | 1 | 1 |
| Gjaldstovan - Talgildu Føroyar | 1 | | | 1 |
| Akstovan | | 1 | | 1 |
| Gjaldstovan | | | 1 | 1 |
| Til samans | 6 | 8 | 18 | 32 |

*Talva 3: Tal av skrásettum undantøkum á Keypsportalinum*

# 5 Keypsportalurin

## 5.3 Keypsportalurin skal dagførast

Keypsportalurin virkar men er tøkniliga afturúrsigldur og eigur tískil at dagførast fyri at gerast meira tíðarhóskandi. Gjaldstovan er í gongd við at gera nýggjan keypsportal.

## 5.4 Tilboðsfyrispurningar skulu skrásetast

Gjaldstovan skal skráseta tilboðs-fyrispurningar fyri at fylgja reglunum í rundskrivinum og er í gongd við at finna útav, hvussu hetta skal setast í verk.

# 6 Sparingar

# 6 Sparingar

Ein greining í 2018 vísti, at landið keypti inn fyri umleið 1,4 mia. kr. um árið. Greiningin vísti eisini, at umleið 1,1 mia. kr. kundi verið og partvíst varð bjóðað út. Niðurstøðan varð, at gjørligt var at fáa eina árliga sparing á 12 mió. kr. við at samskipa og bjóða út landsins keyp av vørum og tænastum. Tað er ikki gjørligt at samanbera okkum beinleiðis við Ísland í hesum máli, men royndirnar hjá íslendingum hava víst eina sparing á umleið 20%, síðan Ríkiskaup byrjaði fyri 20 árum síðan.

Árliga sparingin fyri rammusáttmálarnar hjá Gjaldstovuni liggur ímillum 1 – 1,5 mió. kr. tey seinastu trý árini. Harafturat koma onnur innkeyp, ið fara umvegis keypsportal.fo. og tilboðsfyrispurningar.

Viðvíkjandi røkt av akførum verður mett, at 40% av teimum stovnum, ið ikki eru bundnir av sáttmálanum, velja at brúka hann. Viðvíkjandi byggimarknaðinum er talan um eina varisliga meting, ið svarar til umleið 5% av tí, ið varð keypt fyri á marknaðinum í 2021. Sparingin til samans frá 2020 til og við árslok í 2023, tá ið allir sáttmálar hava verið galdandi í minsta lagi eitt ár, er umleið 7,5 mió. kr. Harafturat koma sparingar, tí størri dentur hevur verið lagdur á økið, og støðugt vaksandi tal av útboðum hava verið á keypsportal.fo síðan 2019.

> *Keypsportalurin hevur seinastu trý árini akkumulerað sparingar fyri á leið 7,5 mió. kr.*

| Ár | Sáttmálaøki | Roknað spard upphædd |
|---|---|---|
| **2020** | Ferðatryggingar | 1.000.000 kr. |
| **2021** | Bil tryggingar | 500.000 kr. |
| | Telduútgerð | 1.000.000 kr. |
| **2022** | Røkt av akførum | 396.000 kr. |
| | Dátusamskifti | 561.000 kr. |
| | Byggimarknaður | 500.000 kr. |
| **Til samans** | | 3.957.000 kr. |

*Talva 4: Mettar sparingar landið hevur havt av at gera sáttmálar við veitarar*

# 7 Samanumtikið

# 7 Samanumtikið

Royndirnar hava víst, at landið hevur havt góð úrslit av at bjóða út alment. Royndirnar hava hinvegin eisini víst, at landið hevði havt størri sparingar, um landsins stovnar bjóðaðu út í felag og vóru meira bundnir av rammusáttmálunum. Gjaldstovan heldur, at landsins stovnar skulu bjóða út í felag og harvið binda seg til rammusáttmálar fyri at fáa meira fyri pening skattgjaldarans.

Tað, at nakrir stovnar sleppa undan ásetingunum í rundskrivinum, máar støðið undan myndugleikanum hjá Gjaldstovuni. Skal rundskrivið fáa ætlaða virknaðin, má tað vera so, at aðalráðini vísa ábyrgd, tá ið stovnar ikki bjóða út ella ikki fylgja rammusáttmálunum.

Gjaldstovan hevur út frá royndum fleiri uppskot til broytingar í rundskrivinum, ið skulu vera við til at økja um talið av útboðum á keypsportal.fo og harvið eisini økja um atgongd og opinleika í sambandi við innkeyp hjá landinum. Dømi um hetta eru lækking av upphæddum og krav um at lata inn hagtøl og aðrar upplýsingar, tá ið stovnar avgreiða útboð.

Í ársfrágreiðingini hjá Landsgrannskoðanini sæst, at fleiri stovnar ikki altíð fylgja reglunum í rundskrivinum um at bjóða út vørur og tænastur vegna vantandi orku og royndir. Fyri at bøta um hesi viðurskifti skal ráðgevandi leikluturin hjá Gjaldstovuni fylla enn meira komandi árini. Amboð og vegleiðingar skulu lætta um vantandi orkuna og betra um førleikarnar hjá landsins stovnum.

Keypsportalurin er afturúrsigldur og verður tískil dagførdur fyri at gerast meira tíðarhóskandi.

# Keyps portalurin



GJALDSTOVAN

Kvíggjartún 1
160 Argir
Telefon 30 24 00
gjaldstovan.fo
gjaldstovan@gjaldstovan.fo